**Harry og Hanna Wilson:**

# Partur av okkara bardagasøgu

**Í summar hittu vit hjúnini 84 ára gomlu Honnu f. Apol og 89 ára gamla Harry Wilson, tá ið tey vóru heima í Føroyum og ferðaðust. Tey bæði eru ein áhugaverdur partur av okkara søgu frá seinna heimsbardaga. Harry var ein av bretsku hermonnunum sum komu higar, og sum fekk sær føroyska konu. Tað er sjálvsagt rættiliga nógv skrivað um hetta, men hvør persónur hevur sína egnu søgu, tí kann altíð okkurt leggjast afturat. Nú er so long tíð farin, at fólkini í hesum parti av okkara søgu eru farin at fækkast. Serliga er hetta galdandi fyri tey hjún, har bæði eru á lívi, og sum eru so væl fyri, at tey kunnu koma higar at ferðast. Tí var tað so sera stuttligt at kunna hitta júst eitt slíkt par og at fáa prát við tey bæði. Henda frásøgn er gjørd í samstarvi við son teirra Louis**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**1. partur**



*Hanna og Harry Wilson í Føroyum í summar*

## Stutt um Harry

Harry kemur frá eini arbeiðaraklassa umhvørvi. Hann er føddur og uppvaksin í býnum Bury norðanfyri Manchester í Lancashire, har tað varð sagt at "bummull er kongur". Bæði foreldrini arbeiddu á verksmiðju. Mamman Sara byrjaði longu sum 11 ára gomul parttíðararbeiði á eini bummullsverksmiðju. So gekk hon eisini part av tíðini í skúla, og var hetta vanligt tá í tíðini. Pápi Harry, sum eisini æt Harry, var handverkari. Hann fór Amerika nøkur ár undan fyrra veraldarbardaga og kom aftur til Bretlands áðrenn bardagin brast á. Har hitti hann Sara, tá ið tey bæði arbeiddu á verksmiðju, sum framleiddi krígsútgerð undir krígnum.

Eftir at vera farin úr skúlanum 14 ára gamal, hevði Harry nøkur smávegis arbeiði, áðrenn hann fór at arbeiða sum skrivstovudrongur á einum arkitektavirki. Hetta gav honum áhuga fyri júst hesum øki, og hann byrjaði at ganga á kvøldskeið at lesa til arkitekt. Hetta varð tó avbrotið, tá ið hann sjálvboðin fór í herin í 1940.

## Stutt um heimsbardagan

Ein fortreyt fyri, at Hanna og Harry funnu saman er 2. heimsbardagi, sum annars er ein tann størsra vanlukkan, sum hevur rakt heimin.

Byrjanin er í stuttum tann, at Hitler kemur til valdið í 1933 og fram til 1939 leggur hann størri og størri part av Europa undir seg meira ella minni við góðkenning av restini av Europa, serliga Bretlandi og Fraklandi. Men í 1939 heldur Bretland, at nú er nóg mikið. Tekur Hitler eitt land afturat, so verður kríggj! Tað er júst hetta sum hendir. Tann 1. september 1939 leggur Hitler á Polen, og 3. september boðar forsætisráðharrin Neville Chamberlain frá, at Bretland er í kríggj við Týskland.

Hetta steðgar nú ikki Týsklandi. Tann 9. apríl 1940 leggur Týskland á Danmark og Noreg. Danmark gevur seg undir beinanvegin, meðan Noreg heldur út einar tveir mánaðir. Tá mugu teir eisini geva upp.

Bretar vilja fyri alt í verðini forða fyri, at Føroyar fylgja við Danmark undir týskt ræði. Teir gera skjótt av, og longu 12. og 13. apríl hersetir Bretland Føroyar, og her byrjar sum so okkara søga, sum vit fara at koma aftur til.

Týskland gevst ikki so. Longu tann 10. mai ger Týskland innrás í Hollandi, Belgien, Luxembourg og norðara part av Fraklandi. Fyrst gevur Holland seg yvir fýra dagar seinni og síðan Belgien 18 dagar seinni.

Bretar høvdu eitt stórt tal av hermonnum í Frankaríki, og teir verða nú so hart kroystir av týsku bardagamaskinuni, at teir mugu evakuerast til Bretlands fyri at sleppa undan at gerast fangar hjá týskarum. Teir fara undan týska herinum, og teir flestu savnast í Dunkerque tætt við belgiska markið við Ermasund. Her er stutt yvir um.

Tá var nú ikki smávegis uppgáva at fáa flutt allar hermenn í tryggleika. Men tað eydnaðist í døgunum 29. mai til 4. juni 1940 at flyta 340.000 bretskar og eisini afturat teimum nógvar franskar hermenn til Bretlands, meðan øll tann tunga útgerðin mátti vera eftir. Í evakueringini luttóku 850 skip. Hetta vóru alt frá herskip til fiskibátar, sum vildu hjálpa til.

Henda evakuering verður sum heild roknað fyri at vera væleydnað og verður kallað "Undrið frá



*Lancastria í friðartíð*



*Hetta var eitt tað seinasta sum sást til Lancastria, sum er størsta vanlukkan hjá bretum undir krígnum*